# KOMMUNUVAL 2024



### HVUSSU KANST TÚ VITA, HVØR FER AT ARBEIÐA FYRI NÁTTÚRUNI OG UMHVØRVINUM Í TÍNI KOMMUNU?

Kommunurnar hava ábyrgd av at umsita náttúru- og umhvørvisøkir á skynsaman hátt, og kommunuvalið er ein upplagdur møguleiki hjá valevnum og listum at geva sítt boð uppá, hvussu tín kommuna kann gerast meira burðardygg og grøn at liva í.

Fyri at hjálpa borgarum at seta valevnunum røttu spurningarnar hevur FNU gjørt ein lista við evnum og spurningum, sum borgarar og orðstýrarar kunnu nýta til samrøður við valevnir og til at seta spurningar á valfundum.

Á hendan hátt verður tað lættari fyri borgarar at velja valevnir, sum veruliga vilja gera mun fyri náttúruna og umhvørvið.

Gott val!



## SPURNINGAR TIL VALEVNIR

### SPILLVATN – REINAR ÁIR OG FIRÐIR

Hvussu fert tú at raðfesta kloakk- og spillvatnsviðurskifti, um tú verður vald/ur, og hvørjar ítøkiligar loysnir ætlar tú at seta í verk?

Hvussu ætlar tú at arbeiða fyri, at kommunan hevur reinar áir og firðir, so at fólk kunnu svimja í sjónum og fara á seiðaberg (í einum reinum umhvørvi uttan skaðiligar bakteriur)?

### ATLIT TIL NÁTTÚRU Í VERKÆTLANUM

Hvussu ætlar tú at tryggja, at byggiverkætlanir verða framdar við atliti til náttúruna og lívmargfeldið?

Eru ítøkilig krøv ella treytir, sum tú vilt seta í verk, so at byggiverkætlanir ikki gera skaða á náttúruna?

Hvussu ætlar tú at arbeiða fyri at verja náttúruøkir í kommununi? Eru nøkur serlig náttúruøkir, sum tú fert at arbeiða fyri at varðveita?

FNU

## LANGTÍÐAR BÝARPLANLEGGING

Hvussu ætlar tú at tryggja, at náttúra og lívmargfeldi fáa ein týðandi leiklut í langtíðarplanleggingini hjá kommununi?

Hvussu ætlar tú at tryggja, at byggiverkætlanir og nýbygging ikki oyðileggja virðismikil náttúruøki?

Eru nøkur serlig økir, sum tú heldur skulu verjast sum ein partur av býarplanleggingini?

## GRØNUR INNKEYPSPOLITIKKUR

Fert tú at arbeiða fyri at kommunan mennir ein grønan innkeypspolitikk?

Hvørji ítøkilig tiltøk ætlar tú at seta í verk fyri at tryggja, at kommunan setur krøv til vøru- og tænastu-innkeyp fyri at minka um náttúru- og umhvørvisárin og stuðla undir heimsmálunum hjá ST?

## UMLEGGING TIL VARANDI ORKU

Hvussu ætlar tú at arbeiða fyri at minka um CO2-útlátið frá kommunalum bilum, bussum og bygningum, og hvussu ætlar tú at máta framgongdina?

Hvussu fert tú at arbeiða fyri at umleggja kommunalar bygningar, samferðslu og tænastur til varandi orku, og hvørji ítøkilig átøk fert tú at seta í verk?





## BETRI RUSKVIÐURSKIFTI

Hvussu ætlar tú at bøta um møguleikarnar at skilja rusk í nærumhvørvinum í tínari kommunu, og hvussu heldur tú, at kommunan skal arbeiða fyri at økja um endurnýtslu av burturkasti?

Hvørji átøk ætlar tú at seta í verk fyri at minka um samlaða burturkastið, og hvussu vilt tú betra um kunning til borgarar?

## GRØNA FERÐSLA

Hvussu ætlar tú at gera tað lættari og betri hjá borgarum at súkkla, ganga og nýta buss í staðin fyri privatbil?

Hvat heldur tú, at kommunan kann gera fyri at fáa borgarar at ganga, súkkla og taka buss fyri at minka um bilferðsluna?

## VEÐURLAGS- OG UMHVØRVISÆTLAN

Ætlar tú at arbeiða fyri, at kommunan setur sær sum mál um at vera CO2 neutral innan eitt ávíst áramál? Um ja, nær heldur tú at kommunan skal vera CO2 neutral?

Hvussu fert tú at tryggja, at kommunan hevur eina ítøkiliga veðurlagsætlan við greiðum málum og tíðarfreistum?

*Hetta er ein umfevnandi listi av spurningum, og tí er ikki vist, at allir spurningarnir hóska seg til allar kommunur.*

FNU